

# ROKNSKAPARFÓLK TIL ATLANTIC PETROLEUM

**Vilt tú gerast partur av eini børsskrásettari fyritøku, sum virkar á altjóða pallinum?**

Vit søkja eftir dugnaligum starvsfólki at hava um hendi bókhald okkara. Starvið fevnir fyrst og fremst um bókhalds- og roknskapararbeiði har atlit skulu takast til serlig viðurskifti og krøv galdandi fyri eina børsskrásetta fyritøku. Umframt bókhaldsstarvið kemur tú í mun til tínar førleikar at luttaka í øðrum uppgávum.

Dentur verður lagdur á at skapa eitt jaligt arbeiðsumhvørvi har starvsfólkini arbeiða sjálvstøðugt og í toymum

**Útbúgving og førleikar**
> tú hevur útbúgving innan bókhald og búskap
> tú hevur hollar royndir innan KT og serstakliga við Navision bókhaldsskipanini
> tú samskiftir væl á enskum

**Persónligir eginleikar**
> tú hevur eitt skipað arbeiðslag
> tú dugir at raðfesta og at halda ásettar freistir
> tú hevur ein jaligan hugburð og ert liðspælari

Til rætta fólkið bjóða vit eitt avbjóðandi, fjølbroytt og spennandi starv í eini fyritøku, sum er í støðugum vøkstri við góðum møguleikum fyri fakligari og persónligari menning.

**Løn og setanartreytir**
Starvið verður sett skjótast til ber. Løn og setanartreytir verða ásettar í mun til tínar royndir og førleikar.

**Umsóknir**
Umsóknir við avritum av prógvum, CV og viðkomandi skjølum verða at senda við vanligum brævi til:

Atlantic Petroleum
Postboks 1228
FO 110 Tórshavn

ella við teldubrævi til: sigurdj@petroleum.fo. Gev gætur, at vanlig brøv skulu hava frámerkið "Roknskaparfólk".

Umsóknarfreistin er 23. mai 2010.

**Meira at vita?**
Vilt tú hava meira at vita um starvið, kanst tú seta teg í samband við Sigurð í Jákupsstovu á tel. 210280 ella á sigurdj@petroleum.fo.

**Um Atlantic Petroleum:**
P/F Atlantic Petroleum er eitt óheft føroyskt oljufelag, sum virkar í altjóða umhvørvi í samstarvi við øðrum oljufeløgum. Felagið hevur ognarpartar í olju- og gassloyvum í Norðsjónum, í keltiska havinum og á føroyska landgrunninum. Samtakið fevnir um móðurfelagið P/F Atlantic Petroleum, Atlantic Petroleum UK Ltd. og Atlantic Petroleum (Ireland) Ltd. Felagið miðar eftir frálandamøguleikum í búnum leitingarøkjum í útnyrðingspartinum av Evropa og sum frá líður eisini á føroyska landgrunninum. Vit stíla eftir eini góðari javnvág millum leiting, útbygging og framleiðslu. Atlantic Petroleum er skrásett á virðisbrævamarknaðunum NASDAQ OMX í Íslandi og í Keypmannahavn. Høvuðssæti felagsins er í Tórshavn, og umframt hevur felagið skrivstovu í London. Í løtuni starvast 7 fólk í felagnum.

www.sansir.fo

P/F Atlantic Petroleum, Gongin 9, Postboks 1228, 110 Tórshavn, Telefon: 350100, Faks: 350101, www.petroleum.fo

ATLANTIC PETROLEUM



Nýggja happadráttarárið byrjar 11. mai | www.das.is

Høvuðsvinningarnir eru:

4 bilar Audi A4
+ 500 túsund f.kr. í viðførisrúminum á tvífaldan seðil.

ella

1 millión f.kr. á tvífaldan seðil.

drigið hvørja viku
52 dráttir um árið





10x500 túsund
38x400 túsund

Skattafríir vinningar í árinum á tvífaldan seðil:
Tíggju á 500 túsund f.kr. og tríati átta á 400 túsund f.kr.
Drigið verður um 50 túsund vinningar í árinum.

Einstakur seðil kostar einans 90 f.kr.
Tað er lætt at spæla í DAS-happadráttinum.
Keyp seðil á www.das.is

HAPPADRÁTTUR das
Vinningar hvørja viku